

## Gamal dyrkaði rúsevni

Rúsevnaløgreglan í afrikanska landinum Nigeria hevur tikið ein mann, eftir at løgreglan var komin eftir, at maðurin dyrkaði rúevnið kannabis í urtagarðinum aftan fyri húsinmi. Tað sjáldsama við málinum er, at tann tikni, sum eitur Sulaimon Adebayo, er 114 ára gamal, skrivar Reuters. Hann noktaði seg sekan, men bleiv kortini settur í varðhald. Løgreglan í Nigeria hevur funnið nógv kannabis í landspartinum Edo. Tann størsti einstaki fongurin, sum varð 80 tons, bleiv funnin í býnum Ibadan.

# Tilfeingisbúðin er hjartað í nýggjari fiskiveiðiskipan



*- Fiskiloyvini eru farin at líkjast meira einum ognarrætti heldur enn einum brúksrætti, tí landsstýrismenn í fiskivinnumálum eftir øllum at døma hava knæsett eina siðvenju, sum hevur flutt ognarrættin frá fólkinum til teirra, sum í síni tíð fingu fiskiloyvini frá tí almenna, segði Tórbjørn Jacobsen á flokstingi Tjóðveldisins*

*Mynd: Gunnar Bjarnason*

**- Gongdin seinastu árini hevur verið rættiliga greið, har ein kapitalisering av rættinum at fiska er farin fram. Eingin ivi er um, at hetta er ein trupulleiki fyri fiskivinnuna – fyri tey, sum starvast í vinnuni og fyri alt samfelagið, segði Tórbjørn Jacobsen á flokstingi Tjóðveldisins í vikuskiftinum**

FLOKSTING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað skerst ikki burtur, at tað, sum meginparturin av Tjóðveldinum hevur lagt dent á í spurninginum um veiðirættindi og rættindini til fiskiríkidømi, er at skipa eina tilfeingisbúð, sum flokkurin rópar tað.

Á flokstingi Tjóðveldisins í Skálavík viðgjørdi Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður og fyrrverandi landsstýrismaður í tilfeingismálum, eisini hesa tilfeingisbúð.

- Bulurin ella hjartað í uppskotinum, sum vit hava smíðað og lagt fyri tingið, er tilfeingisbúðin. Hetta er ein búð, sum tær almennu Føroyar skipa. Eftir 10 árum er ætlanin, at øll rættindi til at taka úr tilfeingi føroyinga – bæði úr okkara egna sjógvi og úr okkara rættindum í fremmandum sjógvi – skulu umsetast og handlast um hesa tilfeingisbúðina.

Tórbjørn vísti á, at ein veksandi umsetiligheit hevur tikið seg upp í fiskidagaskipanini hesi seinnu árini, og hann legði aftrat, at tey flestu hava tikið undir við hesum.

- Hetta hevur ivaleyst gjørt skipanina meira liðiliga, og hetta hevur ivaleyst eisini ment dynamikkin í vinnuni munandi. Spurningurin er bara, hvør skal skipa hesa umseting – tey, ið frammanundan hava fingið rættindini frá tí almenna fyri einki ella tær almennu Føroyar vegna Føroya fólk.

Løgtingsmaðurin vísti á, at tað er trupult at broyta strukturar í eini altavgerandi høvuðsvinnu eftir einum degi, tí tá kundi skaðin skjótt verið størri enn gagnið. Tí er eisini alneyðugt, at vinnan fær høvi at virka í eini skiftistíð, har givnu loyvini verða niðurlagað eftir einum tíggjuáraskeiði.

- Loyvini skulu síðan gerast umsetilig og verða handlað um tilfeingisbúðina, sum skal virka leys av politiskum myndugleikum.

Hann skeyt upp, at tilfeingisbúðin verður stjórnað av eini nevnd, sum vinnan á sjógvi og landi setir, eins og einum dagligum rakstrarleiðara, sum avvarðandi landsstýrismaður setir í starv.

- Í lógini um vinnuligan fiskiskap er rætturin til fiskiloyvini, sum nú eru í umfari, galdandi fram til ársskiftið 2017/2018, legði løgtingsmaðurin aftrat.

Tórbjørn Jacobsen helt fyri, at í størst møguligan mun eiga vit at halda fast um ásettu bólkarnar í lógini, eins og vit eiga at halda fast um skottið millum húk og trol.

- Í 10 ára skiftisskeiðnum, sum eftir er, eigur útróðrarflotin í bólki 5, sum eru bátar undir 15 tons, eisini at vera hildnir uttanfyri skipanina.

Løgtingsmaðurin nam eisini við teir vansar, sum eru í verandi skipan.

Hann segði, at eigarastrukturin í føroyskari fiskivinnu hevur cementerað seg, sum hann málbar seg, hjá teimum, sum upprunaliga og politiskt fingu 10 ára brúksrættin til føroyskt tilfeingi.

- Gongdin seinastu árini hevur verið rættiliga greið, har ein kapitalisering av rættinum at fiska er farin fram. Eingin ivi er um, at hetta er ein trupulleiki fyri fiskivinnuna – fyri tey, sum starvast í vinnuni og fyri alt samfelagið.

Tórbjørn Jacobsen segði, at teir trupulleikar, sum standast av hesum, eitt nú eru veksandi monopoliseringing, eins og rætturin at fiska til endans gerst so dýrur, at ógvuliga fá hava møguleikan at koma inn í vinnuna.

- Seinastu árini eru skip handlaði fyri 5-10 ferðir tað, sum tólini í sær sjálvum eru verd, segði løgtingsmaðurin á flokstinginum í Skálavík.

upp til 80%, men hesum taka vit als ikki undir við. Hetta hevði ikki gjørt tað lættari hjá ungum hugaðum fólki at komið sær upp í vinnuna. Prísurin á loyvum hevði ikki lækkað, men kanska heldur hækkað, tí sjálvandi selur seljarin fyri at fáa sum mest burtur úr.

Í síni framløgu vísti Tórbjørn eisini á tað, sum hann kallaði "lunkaða uppskotið" hjá Bjørn Kalsø, tá hesin sat sum landsstýrismaður í tilfeingismálum.

- Hetta uppskotið snúði seg um at leggja tilfeingisrentu á fiskivinnuna, men hesum tekur Tjóðveldi heldur ikki undir við, tá hetta kemur at kennast sum ein skattur, ið bara kemur at gera raksturin hjá flotanum tyngri.

At umsitingin skal áseta rentuna, helt Tórbjørn eisini vera ein vansa, tí trupult verður hjá uttanfyristandandi at rokna seg fram til, hvat eitt rímiligt gjald skal verða.

- Aðrir hava talað fyri einum marknaði, har øll rættindi, fiskidagar og kvotur á heima,-mið-og fjarleiðum, verða seld yvir eina skivu, sum hitt almenna skipar vegna eigaran, sum sambært lógini er Føroya fólk.

Tórbjørn Jacobsen vísti til stevnumið Tjóðveldisins og segði, at flokkurin hvørki stuðlar brandskatting ella tilfeingisrentu.

- Hinvegin halda vit, at neyðugt er at seta í verk eina sjálvsjavnandi skipan, har vinnan sjálv lagar seg og umsetir innanfyri greiðar almennar karmar og regluverk. Vit halda, at veiðiloyvi og fiskidagar skulu verða almenn brúksloyvi, og umsetingin av hesum eigur at fara ígjøgnum eina tilfeingisbúð – ein gjøgnumskygdan fiskidaga-og kvotamarknað, har øll kunnu bjóða og sleppa framat eftir givnum treytum.

Løgtingsmaðurin helt, at sama skipan eigur at vera galdandi fyri rættindi hjá føroyingum á mið-og fjarleiðum, sum í dag verða býtt út til ávís feløg eftir siðvenju og politiskum frymli, sum hann tók til.

- Hugsjónarliga stendur hesin politikkur í fyrstu grein í stevnu floksins, har dentur verður lagdur á, at "eingin einstaklingur ella nøkur serstøk stætt eigur framíhjárætt til vald landsins og ognir. Føroyingar allir eiga somu samfelagsrættindi og hava somu samfelagsskyldur...", segði Tórbjørn Jacobsen á flokstinginum.